**Bert ein stutt, lítil stund, og eg fari,**

```
E                                   H7
Bert ein stutt, lítil stund, og eg fari,
H7       Fism        H7          E
eins og dúvan til búrið hjá sær;
E                       E7            A
bert ein stutt, lítil stund og eg eigi
    E               H7             E
ta krúnu, sum Gud goymir mær!

   Niðurlag:
   E                          H7
   Mín sál, hon væntar Harran Jesus,
          Fism             H              E
eins og vaktarmaður vónar morgunin;
E                     E7                A
tíðarteknið sýnir greitt, at Jesus kemur,
A          E             H7     E
eins og eysturroði boðar morgunin.
```

2/4. Eina stutta stund enn varir stríðið,
men ein hvíld er í Himli til mín;
eina stutta stund enn má eg bíða,
so tekur Gud meg upp til sín.

3/4. Eina stutta stund tárini renna,
so Gud turkar tey kinnini av;
enn ein stutt, lítil stund, og eg stígi
inn í Himmalsins heim, hann mær gav.

4/4. Skjótt hin seinasti lúður skal ljóða,
Jesus aftur í luftini sæst;
standið vakin, Guds børn, til ta løtu,
tá hann heinta skal síni við hast!

*Svenskur.*
*(P.W. Háberg týddi).*